FISKIMÁLARÁÐIÐ

P/F Kinnfelli
Á Heimaru Bryggju 3
370 Miðvágur

**Stjórnarskrivstovan**
8. apríl 2019
Mál: 18/00254-43
(at tilskila í svari)

**P/F Kinnfelli - Menningarkvota av svartkjafti 2019**

Felagið hevur fingið lutað út menningarkvotu av svartkjafti fyri árini 2018-2021.
Tann 2. apríl 2019 var fundur í Fiskimálaráðnum um kvotuna av svartkjafti, ið eftir er at veiða í 2019, sbr. viðløgdu fundarfrásøgn. Sambært uppgerð frá Vørn seint í mars 2019 eru 6.738 tons eftir av kvotuni.

Fundurin í Fiskimálaráðnum varð hildin eftir umbon frá P/F Kinnfelli og P/F Snarfrost. Frásøgnin frá fundinum lýsir ætlan og sjónarmið, sum leiðsla og umboð fyri omanfyri nevndu feløg hava í mun til veiðu og gagnnýtslu av svartkjaftinum í 2019.

Samanumtikið er ætlanin hendan: P/F Kinnfelli hevur ætlanir um at skipa fiskiskap og framleiðslu innan tvey øki:
1) Svartkjaftur verður goymdur í serstakari køling á skipinum og latin virkinum í Miðvági til frystingar og pakkingar.
2) Svartkjaftur, ið ikki kann skipast eftir leisti 1) verður latin til eitt av teimum størru virkjunum, til dømis Havsbrún í Fuglafirði.

Nøgdin av kvotuni, ið verður viðgjørd á virkinum í Miðvági, verður, sambært upplýsing frá feløgunum, lítil í lutfalli ta fyrstu tíðina, men verður tó byrjanin til ítøkiliga menning innan ætlanina.

**Viðmerkingar frá Fiskimálaráðnum**

Innleiðandi skal sigast, at Fiskimálaráðið í skrivligum tilfari hevur nevnt, at tillutaða kvotan skal gagnnýtast innan fyri verkætlanina. Í seinni umførum hevur verið nevnt, at broytingar skulu góðkennast av Fiskimálaráðnum, áðrenn tær verða framdar í verki. Við grundarlagi í hesum hevur Fiskimálaráðið hesar viðmerkingar.

Fiskimálaráðið metir, at kunningin frá feløgunum kann tryggja eitt grundarlag, sum byggir á eitt virksemi, ið lýkur treytirnar í verkætlanini. Tó má viðmerkjast, at ætlanin innan sjálva rávørutilgongdina í størst møguligan mun má taka hædd fyri virkseminum á landi og virðisøking í tí parti av verkætlanini.

Umboðini fyri feløgini nevndu á fundinum 2. apríl 2019, at fiskiskapurin kundi skipast við fýra túrum, í meðal 1.500 tons fyri túrin. Hetta merkir í stuttum, at virksemið á landi einans verður bygt á fýra royndir.

Í egnari verkætlanarlýsing, sum var partur av umsóknini, vísa feløgini á, at dentur skal leggjast á at fiska smærri nøgdir í senn, tí tað tryggjar betri góðsku á fiskinum. Hetta ber so afturat við sær, at tað í framleiðsluliðinum verður gjørligt at virðisøkja fiskin enn meira. Endamálið er at menna eina "hágóðskuframleiðslu" (kvalititetsframleiðslu). Í hesi lýsing talfesta feløgini tó ikki, hvat hugtakið "smærri nøgdir" fevnir um.

Við grundarlagi í hesum, t.v.s. umsókn, verkætlanarlýsing og tilmæli frá Metingarnevndini, viðmerkir Fiskimálaráðið, at ætlanin í størst møguligan mun má taka hædd fyri virkispartinum á landi, samstundis sum hædd verður tikin fyri skipapartinum. Miðast má eftir, at veidda nøgdin fyri túrin og tíðarskeiðið, ið veitt verður í, má vera á slíkum støði, at framleiðsluliðið hevur møguleikar at leggja til rættis á fullgóðan hátt viðvíkjandi virðisøking og menning. Á henda hátt førir skipið góða góðsku til lands, ið veruliga kann menna hágóðskuframleiðslu á landi. Sum áður sagt, verður hetta mett at vera í samsvari við verkætlanina, ið felagið sjálvt hevur lýst í umsóknini, og sum tilmælið frá Metingarnevndini er grundað á.

**Avgerð og treytir**

Fiskimálaráðið letur við hesum P/F Kinnfelli heimild til at menna ætlanina sambært tí leisti, sum lýst í hesum skrivi, í tilsøgn og í øðrum viðkomandi tilfari í málinum. Avgerðin fevnir bert um svartkjaftaveiðu í 2019 og ta kvotu, ið eftir er av svartkjafti áljóðandi 6.738 tons.

Í sambandi við veiðu og gagnnýtslu setir Fiskimálaráðið fylgjandi treytir, ið eru í samsvari við umsókn, verkætlanarlýsing hjá feløgunum, tilmæli frá Metingarnevndini og tilsøgn frá Fiskimálaráðnum:

1. Veiða og móttøka v.m. skal grundast á royndir, sum ítøkiliga stuðla undir virðisøking av svartkjaftatilfeinginum á skipi eins og á virkinum í Miðvági.
2. Royndirnar skulu ítøkiliga stuðla undir stigvísari nýskapan við høvuðsdenti á góðsku og virðisøking.
3. Royndirnar verða eitt ítøkiligt og týðandi stig ávegis málinum um hágóðskuframleiðslu.
4. Royndirnar verða gjørdar í slíkari støðu, at tær veruliga staðfesta ítøkilig og týðandi úrslit.
5. Royndirnar fevna um tal av túrum og tíðarskeið, sum beinleiðis taka hædd fyri, at tað í framleiðsluliðinum verður møguligt at virðisøkja mest møguligt.

Miðast má eftir, at ætlanin longu í 2019 flytur seg frá royndarstøði og ímóti framleiðslu, ið byggir á handilsligt grundarlag.

Í sambandi við niðurstøðuna skal Fiskimálaráðið vísa á § 4, stk. 3 í kunngerðini um menningarkvotur, um at latast skal ein ávegis frágreiðing, ið lýsir, hvussu kvotan er gagnnýtt sambært menningarætlanini. Frágreiðingin verður nýtt í eftirmeting Fiskimálaráðsins av ætlanini seinni og støðutakan til endurnýggjan av svartkjaftakvotuni.

Aðrar tillagingar/broytingar í verkætlanini skulu fráboðast og góðkennast av Fiskimálaráðnum, áðrenn tær verða settar í verk. Fiskimálaráðið tilskilar sær rættin heilt ella lutvíst at taka aftur tilsøgnina um menningarkvotur, um tillagingar/broytingar í verkætlanini verða framdar uttan góðkenning frá Fiskimálaráðnum.

Rógvi Reinert
aðalstjóri

**Hjálagt: fundarfrásøgn um málið.**